## Matur, dansur og festivaltónar

**Jóansøkufestivalurin fer av bakkastokki leygardagin og alt tykist ganga væl við fyrireikingunum til fyrsta jóansøkufestivalin, ið hevur góðan tónleik, góðan mat og góðan dans aftaná festivalin at bjóða**

FESTIVALUR

*dagfinn@sosialurin.fo*

Jónsøkufestivalurin fer nú inn í fyrireikingarvikuna av álvara og festivaldagurin nærkast. Men alt gongur væl við fyrireikingunum til festivalin, sum verður í skúlagarðinum á Tvøroyri, sum verður skrýddur og gjørdur nýtiligur til endamálið.

Umframt góðan tónleik frá AS Sweet, Nylon, Makrel, Deja Vu, The Dreams, Paradox, Guðrun og eini rúgvu av øðrum føroyskum tónleikarum, verður góður matur og drekka at fáa á festivaløkinum, siga fyrireikararnir.

Festivalurin verður skipaður við tveimum pallum, einum stórum og einum minni palli. Eftir stóra festivaltiltakið, verður dansur í høllini í Trongisvági, at tiltikni bólkurin Revival fer á pallin, og teir borga fyri lívligum dansi. Bussar koyra eftir festivalin til dansin.

Forsølan av atgongumerkjum er byrjað og fáast tey á kunningarstovunum í Suðuroynni, í Tangabúðini, á Flogvøllinum, á Fjørðukrønni í Vestmanna og á Statoilstøðunum í Klaksvík, Saltangará, í Gundadali, á Tvøroyri og í Vági. Heimasíðan hjá Jóansøkufestivalinum er nú virkin og eitur hon

www.joansokufestivalurin.com

# Aldubáran og Tarira framføra Summartónar

**Leygardagin 25. juni kl. 19.30 hevur Aldubáran 10-ára føðingardags-konsert í Norðurlandahúsinum**

KONSERT



*Kórið TARIRA undir leiðslu av Sunleif Rasmussen luttekur eisini á hesi konsertini við einari stuttari og spennandi skrá, sum m.a. inniheldur tvær frumframførslur*

Bólkurin er komin til árs nú. Eingin aldur vildi onkur hildið, men fyri tónleikabólkar av hesum slagi, er tað undrunarvert, at tey hava hildið skútuna gangandi so leingi.

Tey fara at gera nógv burturúr konsertini leygarkvøldið. Har verður ein sera fjølbroytt skrá og fara tey at lata tann klassiska tónleikin í nýggjan ham við teknisku útgerðini, ið er til taks í Norðurlandahúsinum. Eisini hava tey fólk afturat sær, so hesuferð er Aldubáran ein sokallað Sinfonietta, ella eitt lítið symfoniorkestur.

Flestu stovnararnir eru við á hesi konsertini og harafturat hava tey fingið góð fólk afturat sær m.a. unga trompetleikaran Jóhan Hentze, ið gongur á Royal Schottish Academy of Music í Glasgow. Spennandi verður at hoyra henda úrmælingin. Eisini fer íslendski slagverksleikarin Frank Aarnink at leggja nýggjan botn undir.

Harumframt hetta fer yngsti limur í Aldubáruni, Andras Olsen, at framføra eitt sera krevjandi verk eftir russiska tónaskaldið Schnittke fyri trombon og sjey ljóðføri.

Stóra verkið hjá Kristiani Blak "Shaman" verður at hoyra. Her fara Aldubárulimirnir, umframt manandi sang og brumm, at framføra á didgeridoo, japonskum bambusfloytum, látupípum og øðrum.

Ein annarleiðis konsert, ið Bernharður Wilkinson stjórnar. Tey luttakandi eru: Anna Klett, klarinet, Andrea Heindriksdóttir, floyta, Páll Sólstein, horn, Jógvan Zachariassen, fagot, Henrik Skotte, obo, Jóhan Hentze, trompet, Andras Olsen, trombon, Øssur Bæk og Sámal Petersen, violin, Mina Fred, bratsj, Frederik Waage, sello, Thomas Holmsgaard, kontrabass, Frank Aarnink, slagverk, Ólavur Jakobsen, guitar og Jóhannes Andreasen, klaver

Kórið TARIRA undir leiðslu av Sunleif Rasmussen luttekur eisini á hesi konsertini við einari stuttari og spennandi skrá, sum m.a. inniheldur tvær frumframførslur. Tann eina er verkið "Glitra" eftir Unn Paturson, sum nokk er betur kend sum sangari enn tónaskald, men til hesa konsertina hevur hon skrivað eitt sera vakurt lag fyri kvinnurøddir til yrking eftir pápanum, Róa Paturson. Tann seinna frumframførslan er verkið "Vatnið og Ljósið" eftir Kára Bæk. Her skulu átta ymiskar ræddir spíla seg út í einum heiltónaskala. Orðini eigur Karsten Hoydal. Skráin hjá kórinum byrjar við einum verkið fyri tvær sopran solorøddir og kór eftir skotska tónaskaldið James MacMillan. Hann er nógv umbiðið tónaskald og er ofta at síggja á konsertskráum bæði til BBC Promenade konsertir og aðrar altjóða festivalir. Eisini syngur TARIRA verk eftir Paula Hansen og Sunleif Rasmussen og endaspurturin er krevjandi verkið "En ny himmel och en ny jord" eftir svian Sven-David Sandstrøm.

Ein tíma fyri konsertina, kl. 18.30 verður høvið at hoyra tónaskøldini umrøða tónleik teirra. Sunleif Rasmussen og Kristian Blak fara at siga nøkur orð og eisini verður høvið at seta spurningar.

Konsertin byrjar kl. 19.30 og er liður í Summartónafagnaðinum, og atgongumerki fáast í Norðurlandahúsinum.

# Til vatns og til lands í Vágum

**Á jóanssøku skipar Vága Gongufelag fyri forkunnugum náttartúri, har siglt verður fram við landi, áðrenn farið verður til gongu tvørtur um aftur oynna**

NÁTTARTÚRUR

Leygarkvøldið 25. juni verður skipað fyri náttartúri í Vágum. Byrjað verður við siglitúri úr Sørvági norður á Slættanes, og síðan gingið heim aftur eftir gomlu Gásadalsgøtuni til Fjallavatn og haðani til Sørvágs, har endað verður við morgunmati á Hotel Vágum.

Siglt verður fram við norðara armi á Sørvágsfirði. Fram við Gásadali, Sæurðardrangi, Barðinum og Víkum. Til ber at síggja Reipsáfoss og Ritunøvina, áðrenn farið verður fram við Kópamølini og Miðvágsurðini. Víðari verður siglt undir Sandavágsbjørgunum fyri norðan við øllum sínum gjáum og skorum, um Slættanestanga.

Farið verður so á land á lendingini á Slættanesi, har ein stuttur steðgur verður, meðan ein lættur matpakki frá Hotel Vágum verður etin, áðrenn farið verður at hyggja at skúlanum, ið eisini er innrættaður sum kirkja. Vitjað verður eisini úti á vitanum og við báðar kirkjugarðarnar á Slættanesi, áðrenn farið verður til



gongu niðan við Grøvini eftir gomlu Gásadalsgøtuni um Skoradalsháls.

Av Skoradalshálsi verður gingið eftir gøtuni oman gjøgnum Botn og út á Munnan, har sýnt er niður á Viðvíkina og vestur yvir bygdina á Víkum. Gingið verður so fram við Fjallavatni heim til Sørvágs, har túrurin endar við morgunmati á Hotel Vágum.

Tilmelding skal gerast á Kunningarstovuni í Vágum, sum skipar fyri túrinum. Á Kunningarstovuni minna tey á at hava góð gonguklæði, fótbúna og matpakka við til gongurtúrin, tí gingið verður um vátlendi fram við Fjallavatni, har eisini áir eru at fara um